# Troyttandi finala

**Tann stóri finalan í valstríðnum varð sett at vera í Norðurlandahúsinum sunnukvøldið. Floksformenninir brynjaðu seg allir út, men fundurin verður fyrst og fremst mintur fyri at vera ómetaliga langur og serliga troyttandi**

VALFUNDUR

*Orð:Heri á Rógvi*
*Myndir: Jens Kristian Vang.*

*Kristindómurin og fosturtøkur vóru millum virknastu evnini, ið Jenis av Rana átti at bjóða uppá sunnukvøldið*





*The entertainer, Eyðun Elttør. Hann var lættasta innslagið á stóra fundinum í sambandi við løgtingsvalið*

Tað skuldi vera tað heilt stóra. Veljarafundurin sunnukvøldið, ið varð varpaður í hvørt heim í Føroyum. Bæði Útvarp Føroya og Sjónvarp Føroya sendu beinleiðis, og flokkarnir høvdu teirra bestu fólk til staðar. Eingin ivi skuldi vera um, at hetta var eitt avgerandi slag. Tað byrjaði eisini rættiliga áhugavert. Fólk vóru eisini trúgv at møta upp, og stóra høllin í Norðurlandahúsinum var stúgvandi full, eins og at kalla allar Føroyar sótu við skíggjan ella við útvarpstólið.

## Loysing v Samband

Høvuðstemaið til hetta valið hevur verið loysing og samband, og tað var eisini tað, ið merkti innleiðandi formansrunduna. Tað er ofta hendan, sum setir frámerki, har byrjast skal og kjakið fylgir hesari slóðini. Lisbeth L. Petersen, forkvinna í Sambandsflokkinum, lat ongan ivi vera um, hvat hjartamálið hjá Sambandsflokkinum er. Ríkisfelagsskapurin varð einaferð settur í fremstu røð og staðfestur sum borganin - sambært Sambandsflokkinum – fyri einum liviligum vælferðarsamfelagi í Føroyum.

Høgni Hoydal smæddist so avgjørt ikki burtur í fyrstu rundini. Hann nýtti ógvuliga smidliga vendingar og slap ómetaliga væl frá sínari røðu. Hegnisliga bar hann eina lítla heilsan til hvørt valdømið við minnum um framburð.

Jenis av Rana og Miðflokkurin seta teirra álit á Gud í øllum spurningum, og tað var eisini hetta sama, ið eyðkenti taluna hjá formanni floksins. Miðflokkurin tvíheldur um eina leið, sum mest av øllum er grundað á skriftstøð. Hann segði einki um hvørki loysing ella samband.

Løgmaður Anfinn Kallsberg tosaði í ógvuliga rundum setningum og tosaði mest um framburðin – sambært honum – seinastu árini. Hann tók ikki ríkisrættarliga spurningin upp á tungu. Ein spurningur, ið samgongan undir hansara leiðslu, hevur sett sum sítt fremsta mál.

Jóannes Eidesgaard talaði sum hann plagar til breiðu fjøldina. Ivast nakað áðrenn, so var tað eingin ivi aftaná, at Jóannes hevði sagt í sínum fyrstu tríggjar minuttinar. Javnaðarflokkurin er eingin loysingarflokkur. Tvørturímóti virkaði formaður floksins hetta kvøldið mestsum eins nógv sum verji fyri Ríkisfelagsskapin sum forkvinna Sambandsfloksins.

Teir fyrstu tríggjar minuttir hjá sær nýtti Eyðun Elttør til at tosa breitt. Hóast restin av fundinum gjørdist ein stór láturbylgja frá formanni Sjálvstýrisfloksins, so megnaði hann at halda – eitt sindur – av látrinum aftur teir fyrstu minuttirnar. Hann tosaði ógvuliga breitt og segði lítið.

## Drúgt

Tá tað er sagt um formansrundina, so gekk ikki beinleiðis framá við fundinum. Stevið gjørdist støðugt tyngri og tyngri, og fundurin misti skjótt tann brodd, ið vit kenna frá tílíkum fundum frá árum frammanundan.

Longdin á fundinum tókst at gerast óendalig, og kjakið misti skjótt mettandi eginleikan í fjøldini, har stólarnir – í øllum førum í Norðurlandahúsinum – gjørdust tungir at sita á.

Fundurin vardi í langar tríggjar tímar, og tað vóru fleiri, ið hildu hetta vera í so leingi. Hevði tað ikki verið fyri konstanta látrinum frá Eyðuni Elttør, so hevði ikki verið so liviligt í salinum.

Fimm evni vóru tikin fram, og hetta var kanska eisini eitt evni ella tvey ov nógv.

Fleiri av framsøgufólkinum, ið høvdu hálvannan minutt, kendu ikki so nógvan frið á sær, soleiðis at fóru heilt frá evninum og persónligar agitatiónstalur vóru veruleiki.

Ikki tí. Onkur av framsøgurøðunum hevði hampuligt stev og ítøkilig orð. Fleiri av røðunum um mentanarpartin vóru heilt hampulig góðar, men tað kann so avgjørt ikki sigast tað sama um allar av framsøgurøðunum.

Flestu áskoðarnir í salinum høvdu óivað longu avgjørt, hvar krossurin skuldi setast, og fleiri vóru at rokna sum vanliga viðhaldsfólk og tey góvu eisini til kennar.

Fleiri av teimum kendu innanhýsis bardøgum vórðu heldur ikki veruleiki hetta kvøldið.

Fundurin gjørdist ógvuliga drúgvur, og hetta kostaði fyri tiltakið, sum er eitt gott hugskot. Eisini kostaði tað óivað soleiðis, at atkvøðurnar ikki í stóran mun skiftu hendur.



*Hóast Anfinn Kallsberg hevði lítlan og ongan hug at tosa um loysingina, so vóru tað aðrir í Fólkaflokkinum, ið fegnir tóku evnið upp. Ein teirra var Bjarti Mohr.*



*Bæði Anfinn Kallsberg og Jóannes Eidesgaard høvdu sítt at hugsa um á stóra veljarafundinum*



*Lisbeth L. Petersen og Høgni Hoydal tosaðu eftir hvør sínum lagi sunnukvøldið Hvørgin flokkur flutti seg og høvuðsnøvini í polariseringini varðveittu teirra støðu á pólunum.*



# Slagið um tinganes

**Veljarin skal í dag gera av, hvør skal manna fremstu sessir landsins í løgtingi og landsstýri. Vit hava ringt floksformenninar upp, og kannað eftir, hvussu teir hava upplivað valstríðið**

VAL

*Heri á Rógvi*



*Tað verður spurningurin, hvør kemur at sita við landsins leiðslu. Løgmansevnini eru funnin hjá summum, men aðrir taka ikki spurningin upp fyri enn eftir valið.*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Nógv hevur verið gjørt burturúr valstríðnum hesaferð. Tað eru nú góðar seks vikur síðani, at Anfinn Kallsberg, løgmaður, útskrivaði val. Valstríðið hevur nú hildið á síðani. Vit hava tikið ein rundtúr í flokkunum og spurt um valstríð, løgmansevni v.m.

## Høgni Hoydal

– Eg haldi, at valstríðið hevur gjørt tað púra klárt, at hetta er eitt lagnuval, har fólkið skal gera greitt, hvørt tað ynskir eina loysn við einari nýggjari heimastýrislóg sum Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin hava tosað um, ella fólkið ynskir at taka fullveldi, sigur Høgni Hoydal, formaður Tjóðveldisfloksins.

– Øll vita vit, at vit standa við at vegamót, leggur formaðurin afturat.

Hann heldur, at valstríðið hesaferð hevur sum heild verið siðiligt, men honum dámar einki, at formaður Javnaðarfloksins hevur rópt Tjóðveldisflokkin fyri líkan hjá Le Pen og hansara nationalistiksa flokk, og tað heldur Høgni vera alt ov langt úti.

– Tað nýggja í valstríðnum er kanska, at valið hesaferð snýr seg ikki um vælferð mótvegis fullveldi, men heldur, at tað eru tveir mátar at byggja eina vælferð uppá, sigur Høgni Hoydal.

Tá vit tosaðu við Høgna mánamorgunin, so var hann ikki í holt við at fyrireika seg uppá at gerast løgmaður.

– Tað er kanska sannlíkt, at tað verði eg, um vit koma so langt, men tað eru ikki persónar, sum eru avgerandi fyri okkum, sigur Høgni Hoydal.

Hann vónar framvegis, at Javnaðarflokkurin er til at tosa við, tá tað snýr seg um samgongumøguleikar á sjálvstýrisleið.

## Jóannes Eidesgaard

– Eg haldi, at valstríðið hevur verið ov langt. Valstríðið hevur vart í seks vikur, og tá er stórur vandi fyri at troytta veljararnar, sigur Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins. Verður tað soleiðis, at Javnaðarflokkurin fær løgmann, so verður hetta Jóannes Eidesgaard. Hetta er longu avtalað innanhýsis í flokkinum.

Jóannes Eidesgaard vísir á, at tað hevur verið eitt øðrvísi valstríð. Tað hevur ikki verið so nógv kjak millum flokkarnar. Hann nevnir, at floksformenninir bara hava hitst tvær ferðir hesar seinastu vikurnar, síðani valið varð útskrivað.

– Valið nú snýr seg nógv meira um marknaðarføring enn áður. Persónar og andlit verða sett nógv meira fram enn hugsjónir, sigur Jóannes Eidesgaard.

Hann heldur, at talan hevur verið um eitt siðiligt valstríð á almennum fundum í útvarpi og sjónvarp, men aðrastaðni hevur verið minni siðiligt.

## Lisbeth L. Petersen

– Eg haldi, at valstríð hevur verið langt – kanska ov langt. Alt loypir saman nú endanum. Hetta er eisini heilt annað valstríð enn vit hava sæð áður, sigur Lisbeth L. Petersen.

Í Sambandsflokkinum er spurningur um, hvør skal vera løgmaður ikki umrøddur enn, og tað verður hann heldur ikki, fyrr enn hendan støðan kemur.

Hetta er fyrstu ferð, at hon roynir seg sum floksformann til eitt løgtingsval, og hetta er ein uppgáva, ið er øðrvísi enn at vera valevni, sigur Lisbeth.

Hon heldur annars, at valstríðið er vorðið nógv meira amerikaniserað, har tað meira eru persónar enn ideologiir, sum koma fram, men høvuðsteimaið er ideologiskt, sigur Lisbeth L. Petersen.

– At høvuðstemaið er loysing og samband er einki løgið, tí hetta hava tey seinastu árini snúð seg, sigur forkvinna Sambandsfloksins.

– Nú fara vit at fyrireika okkum endaliga til valið og eina møguliga samgongu, so taka vit tað harfrá, sigur Lisbeth L. Petersen.

Óli Breckman

Tað ber ikki til at fáa hendur á Anfinni Kallsberg, so vit bóðu Óli Breckman, formann í tingbólki Fólkafloksins svara ístaðin.

– Eg má siga, at valstríð er vorðið meira kommersielt og meira amerikanskt, sigur Óli Breckman.

Hann rósar fjølmiðlunum og serliga Útvarpinum og Sjónvarpinum fyri at arbeiða miðvíst í sambandi við valið.

Valið heldur hann hevur verið siðiligt og ein passandi mong av fullveldisspurninginum hevur verið frammi sum tema, heldur hann.

Anfinn Kallsberg er løgmansvalevni hjá Fólkaflokkinum.

## Jenis av Rana

–Tað er gjørt ov burturur valstríðnum. Tað hevur troyttað veljararnar, sigur Jenis av Rana, formaður í Miðflokkinum.

Hann heldur, at sjónvarp og útvarp hava gjørt ov nógv burturúr, og tað kundi verið betri samskipað, heldur hann.

Hann heldur, at tað hevur eydnast, at fingið onnur tema enn loysing samband, men tað hevur í stóran mun verið hetta.

Valstríðið er strævið fyri ein so lítlan flokk sum Miðflokkin, sigur Jenis. Hann heldur, at talan hevur verið um siðiligt valstríð og øll hava fingið somu viðferð.


Trivnaðarmál



- Nýggjur bústaðarpolitikkur
- Nýggjur barnapolitikkur
- Nýggjur eldrapolitikkur

Elin Lindenskov C
Javnaðarflokkurin
www.lindenskov.com


# 33.357 fólk kunnu fara á val

**Roknast kann við størstu vallutøkuni nakrantíð til valið í dag. 33.357 fólk hava valrætt í teimum sjey valdømunum**

VAL

*Heri á Rógvi*

Í dag skal vera val vera um alt landið. 33.357 fólk hava vælrætt. Hetta sigur heimasíðan hjá Løgmansskrivstovuni, sum umsitur valið, www.tinganes.fo.

Tað er soleiðis, at við seinasta val í 1994 høvdu 31.609 fólk valrætt. Sostatt eru tað 1.748 fólk fleiri, ið kunnu fara á val í dag enn fyri fýra árum síðani.

Í 1994 var valluttøkan 87,6, og tað er alt sum bendir á, at áhugin er stórur fyri valinum hesaferð. Longu er tað byrjað at regna við brævatkvøðum til ymsu valstøðini.

Største valdømið er Suðurstreymoy, har 12.478 fólk skulu velja átta valdømisvald umboð. Á sandoynni fara 1.080 fólk at velja tveir valdømisvaldar tingmenn.